Almannamálaráðið

Dagfesting: 02. november 2020
Mál nr.: 20/00839
Málsviðgjørt: PL

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 51. Almannaverkið leggur tilmæli fyri tvingsilsnevndina um, at Almannaverkið veitir persóni tryggjaða búfyriskipan sambært § 50, tá: 1) Almannaverkið sambært dómi ella rættarúrskurði skal veita vardan bústað sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3,	**1.** § 51, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis: "§ 51. Almannaverkið leggur tilmæli fyri tvingsilsnevndina um, at Almannaverkið veitir persóni tryggjaða búfyriskipan sambært § 50, tá: 1) Almannaverkið sambært dómi ella rættarúrskurði skal veita bústað sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3 og § 49, stk. 2,"
§ 51. ... *Stk. 2*. ...	**2.** Í § 51 verður aftaná stk. 2 sum nýggj stk. sett: "*Stk. 3*. Gildistíðin fyri tryggjaða búfyriskipan kann í mesta lagi verða 6 mánaðir hvørja ferð. *Stk. 4*. Hóast gildistíðina í stk. 3 skulu myndugleikin og leiðslan støðugt meta um ítøkiliga tørvin á inntrivinum, ið góðkenningin er grundað á, og tillaga

	ella steðga inntrivinum, um inntrivið ikki longur er neyðugt. *Stk. 5.* Er gildistíð ásett í dómi ella rættarúrskurði, er henda galdandi hóast ásetingina í stk. 3. *Stk. 6.* Gildistíðin fyri tryggjaða búfyriskipan til ung, ið eru dømd sambært § 74 a í revsilógini, skal samanlagt ikki vara longur enn 12 mánaðir. Er talan um uppihald á tryggjaðari búfyriskipan saman við uppihaldi á vardum bústaði, er gildistíðin í mesta lagi 18 mánaðir samanlagt." Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 7 og 8.
§ 51. ... *Stk. 2-3*. ... *Stk. 4*. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skipan og góðkenning av tryggjaðum búfyriskipanum, umframt nærri reglur um treytir, gildistíð, uppihald og karmar kring tryggjaðar búfyriskipanir.	**3.** Í § 51, stk. 4 verður "gildistíð," strikað.
§ 52. Skal persónur setast á fyribils ella vardan bústað í Føroyum ella í øðrum parti av ríkinum sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3, og setir persónur seg ímóti hesum, veitir løgreglan eftir áheitan frá Almannaverkinum hjálp at flyta persónin á bústaðin.	**4.** **§ 52.** Skal persónur setast á fyribils ella vardan bústað í Føroyum ella í øðrum parti av ríkinum sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3 ella § 49, stk. 2, og setir persónur seg ímóti hesum, veitir løgreglan eftir áheitan frá Almannaverkinum hjálp at flyta persónin á bústaðin.
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.